# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Órógv um Marknagil

Hugskotið um ein depil ella eitt sentur fyri miðnámsútbúgvingar í Marknagili kom í tøkum tíma. Undir undanfarnu samgongu varð gjørd ein ætlan um broytingar í miðnámsskúlaøkinum. Hesar broytinmgar eru bæði innihaldsligar og bygnaðarligar og óneyðugt er at siga, at hesar broytingar vóru hart tiltrongdar. Ein fortreytin fyri hesum broytingum var, at tað bar til at samskipa hesar útbúgvingar á einum og sama staði. Tíverri var ikki politisk semja í undanfarnu samgongu um, at eisini skúlin í Hoydølum skuldi gerast partur av ætlaða deplinum. Hetta var ein álvarsamur veikleiki við tí fyrru marknagilsætlanini. Men so kom vend í við tað, at sitandi samgonga megnaði at skapa semju um eina broytta marknagilsætlan, sum eisini fevndi um skúlan í Hoydølum. Henda avgerð var avgjørt ein styrki fyri verkætlanina og fyri alt miðnámskúlaøkið.

Verkætlanin í Marknagili er góð, tí hon fevnir um so nógvar møguleikar fyri rationaliseringum, felags rakstri og samlestri tvørtur um skúlaformar og faklig mørk. Hesin leistur hevur í mong ár verið kendur í okkara grannalondum og har royndur við góðum úrslitum. Hartil kemur so hetta, at okkara umskipaða og nútímansgjørda universitet jú eigur stórt grundøki oman fyri Marknagilsvegin. Tað er upplagt at samskipa partar av virksemi, hentleikum, útgerð og verkløgum. Stovnarnir kunnu bindast saman við tunnli undir Marknagilsvegnum og kunnu so eitt nú hava felags matstovur, teld, høli til kreativu kærugreinirnar, ítrótt o.m.a.

Marknagilsætlanin krevur, at allir partar skulu hugsa øðrvísi og læra at leggja niður gomul mørk og gamlar vanar. Men er ikki júst hetta ein fortreytin fyri, at miðnámsskúlarir og hægru útbúgvingarnar skulu megna at hevja seg upp á hægsta altjóða støði, soleiðis sum sett er út í kortið við Visjón 2015? Tað er tí sera harmiligt og ikki sørt vandamikið, at ivi nú tekur seg upp um marknagilsætlanina,og almenningurin eigur at fáa at vita, hvør ið hevur skapt hendan ivan. Tíðindini í gjár um, at stór ósemja hevur tikið seg upp millum teknisku skúlarnar um býtið av útbúgvingartilboðum, boðaðu ikki frá góðum. Hvat er hetta fyri nakað? Hví skal Mentamáláráðið gera av, hvørji tilboð eru hvar? Er hetta ikki at gera seg inn á sjálvræðið hjá sjálvsognarstovnunum? Mentamáláráðharrin varð spurd um hetta mál, men hon svaraði ikki teimum mest áhugaverdu spurningunum, og ongin gjørdist klókari av hennara svari. Býráðsformaðurin í Tórshavn var rísin og minti á fortreytirnar fyri, at Mentamáláráðið fekk grundøkið frá Tekniska skúla í Havn. Tað tykist sum marknagilsætlanin hongur í einum klønum tráð og almenningurin fær einki at vita, uttan so at onkur reisir málið á tingi. Hetta er eitt álvarsamt mál, og alt eigur at koma á borðið skum skjótast.

**Sosialurin**

## Tilboð til børn hjá sjúkum foreldrum

TÍÐINDASKRIV
*v/ Føroya Felag Móti Krabbameini*
*Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari*

Aftur í vetur skipar Føroya Felag móti Krabbameini fyri samtalubólkum fyri børn, ið hava foreldur, sum eru rakt av krabbameini.

Bólkar við børnum og ungum í skúlaaldri upp til 18 ár koma saman eina ferð aðru hvørja viku tveirtríggjar tímar hvørja ferð í gjøgnum veturin.

Endamálið er at geva børnum og ungum eitt forum, har tey kunnu tosa um sjúku og kenslur og tankar í tí sambandi uttan at taka atlit til onnur enn seg sjálv.

Eins og í fjør fer Kathrina Lindenskov Joensen, sjúkrarøktarfrøðingur og sálarfrøðingur, at taka sær av bólkunum.

- Í gerandisdegnum hjá hesum familjum gongur tað mesta upp í sjúku og viðgerð. Ofta er tað soleiðis, at børnini verja foreldrini og øvugt, so børnini ikki altíð fáa sett orð á til dømis, at tey eru bangin. Tað hevur sera stóran týdning fyri tey at hitta onnur í somu støðu. Fyri at kenna, at tey eru ikki einsamøll, men eisini fyri at hava eitt stað har tað ber til at tosa frítt og opið, sigur Katrina L. Joensen.

Børn reagera ymiskt, tá ið mamman ella pápin gerast álvarsliga sjúk. Summi byrgja seg inni, onnur royna alt tey megna ikki at gera nakran roks burtur úr sær sjálvum og gera øllum øðrum til vildar, meðan onnur broyta atburð, sýnast órólig og ørkymlað.

Sjúkan setur stór og nýggj krøv til foreldrini at tosa við børnini um truplar tankar og kenslur, men ofta hava foreldrini orsakað av sjúkuni ikki neyðuga yvirskotið og orkuna sum skal til, og tá verður tað upp aftur verri hjá børnunum at tosa opið um sjúkuna og avleiðingarnar, hon hevur við sær.

Børn og ung, hvørs foreldur eru lívshóttandi sjúk, eru tí ofta ógvuliga einsamøll við sínum tankum og ótta.

Meira fæst at vita við at venda sær til Føroya Felag móti Krabbameini á tlf 317959 ella 217959.

**Børn og ung:**

## Margarinfabrikkin - ein persónlig uppdagingarferð

TÍÐINDASKRIV
*Margarinfabrikkin*

Margarinfabrikkin er virkishús fyri børn og ung í Tórshavnar Kommunu. Her eru virkin og dugnalig starvsfólk, ið hjálpa tykkum at uppdaga dygdir, ið kanska sjálvdan koma til sín rætt. Okkara besta amboð er tykkara skapanarevni, meðan sjálv menningin er málið í virkseminum hjá okkum í Marganrinfabrikkini. Børn og ung frá 3. flokki til 18 ára aldur kunnu nýta húsið. Harumframt skipa vit fyri almennum tiltøkum, so sum vælgerðarátøkum og stevnum av ymsum slag. Margarinfabrikkin er rús- og roykfrítt hús.

**Umhvørvið**
Hugburðurin er, at vit eru tað, sum vit nú einaferð eru. Øll duga ikki alt, og tað er í lagi. Vit halda at hetta jaliga umhvørvið er gott fyri nýggj vinabond og lærir tann einstaka tolsemi og at hava yvirkskot í samstarvi við onnur. Men vit læra eisini ymiskt praktiskt og listarligt arbeiði.

Starvsfólkini hava pedagogiskar, tøkniligar, listarligar og terapeutiska førleikar. Møguleiki er eisini fyri persónligari ráðgeving. Í góðum samstarvi við foreldrini, stjórnar Bogi Andreasen virkseminum í Margarinfabrikkini.

**Til brúkaran**
Gjøgnum spøl, dans, teldu, tónleik, matgerð, listarbeiði, kappingar, spontanar útferðir og annað, fært tú stuttleika og spenning í tilveruna. Tú kanst eisini leiga eitt venjingarhøli á loftinum, um tú og vinfólkini hava ein tónleikabólk. Húsið er rúmligt og eingin verður tvingaður til nakað. Men vit mæla til, at tú tekur lut í virkseminum, so øll eru saman um húsið.

Børn frá triðja til sjeynda flokki brúka húsið frá klokkan 11.30 til klokkan 17.00. Og so koma tey eldru aftaná. Fríggja- og leygarkvøld er opið frá klokkan 20.00 til 02.00. Onkur frávik eru tó frá hesum tíðum.

**Finn tín innara dansara**
Skráin 2008/09 er sera fjøltáttað. Her er skeið í dansi, og undirvísing í sangi og samanspæli. Droymir tú um at verða listamálari, gera mat í Sjónvarpinum, seyma brúdleypskjólar, ella at vinna spurnarkappingar í Útvarpinum, ja, so kann Margarinfabrikkin vera ein góð byrjan.

Hetta skeiðið eru eisini konsertir á skránni. Men eisini onnur nýggj og avbera spennandi tiltøk eru í umbúna, sum vent verður aftur til seinni. Gleð teg :o). Tað snýr seg um at hava tað stuttligt.

**Hvussu sleppur tú á liðið?**
Tað er sera einfalt. Tú fært eitt limaskjal á Margarinfabrikkini, sum tú letur foreldrunum at fylla út og skriva undir. Árligi kostnaðurin er 300 krónur. Nærri upplýsing fæst við at venda sær til Margarinfabrikkina.

*farbrikkin@torshavn.fo*
*www.margarinfabrikkin.fo*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.